Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður:

Stuðulsfólkaøkið er ein hurlivasi

– Tørvurin eftir stuðulsfólki er komin áðrenn skipanin, og tað hevur havt við sær, at økið er ein hurlivasi. Men nú skulu vit hava skil á økinum, sigur landsstýrismaðurin við almannamálum

STUÐULSFÓLK
Eyðun Klakstein

Landsstýrismaðurin við almannamálum lovar nú, at skil skal koma á stuðulsfólkaøkið

– Vit hava í grundini onga veruliga skipan við stuðulsfólkum, og tí er hetta økið ein stór fløkja, og tað kann eingin liva við.

Tað sigur Sámal Petur í Grund, sum hevur fingið eitt ávegisálit um stuðulsfólkaøkið.

Sosialráðgevin, Eyðvør Thomsen, hevur kannað økið, og hon hevur latið landsstýrismanninum eina ávegis frágeiðing. Hon er nú farin undir víðari kanningar av økinum.

– Tað er vanligt, at almannaverkið roynir at hjálpa fólki, men tað hevur verið eitt sindur ógreitt við, hvørjir møguleikar eru við stuðulsfólkum, og hvussu tilboðini skulu verða. Hetta hevur skapt eina hurlivasa, sum vit nú skulu hava skil á, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður

– Tørvurin eftir stuðulsfólki er komin áðrenn skipanin, og tað hevur havt við sær, at økið er ein hurlivasi. Men nú skulu vit hava skil á økinum, sigur landsstýrismaðurin við almannamálum.

Fólk í vónleysari støðu

Talið á stuðulsfólkum er vaksið nógv seinnu árini, og eftir stuttari tíð eru útreiðslurnar til stuðulsfólk farnar úr fáum milliónum og upp í 30 milliónir.

Men eingin verulig skipan hevur verið økinum, og tað hevur skapt stórar trupulleikar. Stuðulsfólk kenna seg ótrygg í skipanini, og tey hava vánaligar arbeiðsumstøður. Hetta ger, at stór útskifting er millum stuðulsfólkini, og tað líða so foreldur og børn eisini undir.

Í blaðnum í gjár greiddi Hannvør Johansen í Klakksvík frá, hvussu ómetaliga trupul støðan hjá henni er. Hon hevur drong, sum er spastikari, og hóast øll eru samd um, at hann hevur brúk fyri hjálp, tá hann skal í skúla, so ber ikki til at fáa eina haldbara og varandi loysn.

Stuðulsfólkið hjá soninum verður sagt úr starvi fleiri ferðir um árið, og nú skúlagongdin byrjar aftur mánadagin, er einki stuðulsfólk til at fara í skúla við dreinginum, sum skal byrja í 6. flokki.

Hava roynt at hjálpa

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, ásannar, at nógv fólk hava trupulleikar á hesum økið, og hann heldur, at orsøkin til tað er, at økið er so illa skipað.

– Tað er vanligt, at almannaverkið roynir at hjálpa fólki, men tað hevur verið eitt sindur ógreitt við, hvørjir møguleikar eru við stuðulsfólkum, og hvussu tilboðini skulu verða. Hetta hevur skapt eina hurlivasa, sum vit nú skulu hava skil á, sigur hann.

Eyðvør Thomsen sigur í sínum ávegisáliti, at stuðulsfólkaøkið er so stórt, at tað ber ikki til at gera eina lidna frágreiðing um tað í einum. Tí er hon nú farin undir at kanna vaksmannaøkið, og tað verður gjørt fyrst, tí her er púra greitt, at heimildarnar eru ikki í lagi til at seta stuðulsfólk.

– Men tá tann parturin er liðugur, verður beinanvegin farið í holt við restina av økinum. Eg kann ikki siga, nær vit verða liðug við arbeiðið, men eg kann vissa øll um, at vit arbeiða so skjótt sum gjørligt fyri at loysa hesar trupulleikar, sigur Sámal Petur í Grund.

Smátjóðamentan í altjóðasamfelag

RÁÐSTEVNA UM MÁL

Nýggja samkomuhøllin á Sjómansskúlanum í Havn verður karmur um eina føroyska/íslendska ráðstevnu um vikuskiftið, nevnd Smátjóðamentan í altjóðasamfelagi.

Talan er um eitt granskingarsamstarv millum Fróðskaparsetur Føroya og Heimspekideild Háskóla Íslands.

Fyrilestrar verða hildnir, og eru teir allir almennir, og tað er ókeypis atgongd. Byrjað verður kl 9 í morgin ári, leygarmorgunin. Skráin sær soleiðis út:

Leygardagur 18.08.2001:

9.00-9.30: Malan Marnersdóttir, rektari Fróðskaparsetursins, setur ráðstevnuna.
9.30-10.00: Guðmundur Hálfdanarson: »Eigi víkja!« Þjóðernisvitund og pólitísk menning Íslendinga.
10.00-10.30: Bergur Berg: Politisk mentan og smátjóðir.
10.30-10.45: Kaffisteðgur.
10.45-11.15: Gauti Kristmannsson: Þýðingar meðal smáþjóða.
11.15-11.45: Jákup í Skemmuni: Týðing sum mentanarvirksemi.
11.45-13.00: Døgurðasteðgur.
13.00-13.30: Úlfur Hjörvar: Frændrækni. - Ígripaþankar um menningarsamskipti Færeyinga og Íslendinga og hvað helst mætti vera þeim til framdráttar
13.30-14.00: Ólavur Christiansen: Ymiskleikar, líkleikar, avbjóðingar, andsagnir og nøkur tilmæli viðvíkjandi búskaparligu og vinnuligu leiðini hjá smásamfeløgunum, serliga náttúrutilfeingisheftum smásamfeløgum.

Sunnudagur 19.08.2001:

9.00-9.30: Turið Sigurðardóttir: Postkolonialisma. Staðseting og nøvn í nýggjastu føroysku bókmentum.
9.30-10.00: Dagný Kristjánsdóttir: Tvö brúðkaup — en engin jarðarfør.
10.00-1030: Jógvan í Lon Jacobsen: Tungumál smátjóða í altjóðasamfelagi.
10.30-11.00: Kaffisteðgur.
11.00-11.30: Sveinn Agnarsson: Fiskveiðar og byggðamál á Íslandi 1980-2000.
11.30-12.00: Annika Wardum: Føroyska ferðavinnan — nútíð og framtíð.
12.30-13.00: Þorleifur Þór Jónsson: Þróun íslenskrar ferðaþjónustu og framtíðarhorfur.
13.00-14.30: Døgurðasteðgur.
14.30-15.00: Þórarinn Sólmundarson: Stoðkerfi atvinnulífs á Íslandi - nýsköpun
15.00-15.30: Kaffi og almenn umrøða
15.30: Nevndarfundur.

Íslendsku fyrilesararnir:
Dagný Kristjánsdóttir, dr.phil., professari í íslendskum bókmentum við Háskóla Íslands. dagny@hi.is
Gauti Kristmannsson, bókmentafrøðingur, tímalærari við Háskóla Íslands. gautikri@hi.is
Guðmundur Hálfdanarson, professari í søguvísindum við Háskóla Íslands. ghalfd@hi.is
Sveinn Agnarsson, serfrøðingur við Hagfrøðistovn Háskóla Íslands. sveinnag@hi.is
Þorleifur Þór Jónsson, hagfrøðingur við Samtøku ferðatænastunnar. thorleifur@saf.is
Þórarinn Sólmundarson, serfrøðingur á menningardeild Útjaðarastovnsins. thorarinn@bygg .is

Føroysku fyrilesararnir:
Bergur Berg, cand.scient.pol., fulltrúi. beb@fl.fo
Ólavur Christiansen, cand.polit. et soc., granskari á Fróðskaparsetri Føroya. olavurc@setur.fo
Jógvan í Lon Jacobsen, mag.art, adjunktur í málfrøði á Fróðskaparsetri Føroya. jogvanlj@setur.fo
Turið Sigurðardóttir, mag.art., lektari í norðurlendskum bókmentum á Fróðskaparsetri Føroya. turids@setur.fo
Jákup í Skemmuni, cand.phil., týðari. jakups@get2net.dk
Úlfur Hjörvar, rithøvundur og týðari. lupus@post.olivant.fo
Annika Wardum, cand. negot., fyrrv. stjóri á Ferðaráði Føroya.

Ráðstevnuni hava hesi stuðlað:
Granskingarráð Føroya, Letterstedska Föreningen, FITUR.
Ráðstevnan er liður í samstarvi millum Heimspekideild Háskóla Íslands og Fróðskaparsetur Føroya. Samstarvið er skipað gjøgnum eina føroyska og eina íslendska nevnd. Í føroysku nevndini eru: Turið Sigurðardóttir form., Jóhan Hendrik W. Poulsen, Malan Marnersdóttir og Anfinnur Johansen. Í íslendsku nevndini sita: Ingi Sigurðsson form., Þóra B. Hjartardóttir, Pétur Knútsson, Magnús Snædal og Höskuldur Þráinsson.

Samgongan haltar framhaldandi

Samgongupolitikarar hava eftir øllum at døma ilt við at halda politiskar avtalur, ella í minsta lagi lætt við at misskilja tær. Ein dropi ov nógv er fallin í bikarið hjá fíggjarmálaráðharran um, sum nú alment svarar átalum frá løgmanni aftur

SAMGONGUSTEV
Rúnar Reistrup



Karsten Hansen vil ikki hava sitandi á sær orðini frá løgmanni um, at uppskot hansara um Búskapargrunn Føroya bara er hálvliðugt. Løgmaður stendur við orð síni

Stevið í sitandi samgongu er ikki av tí besta. Tað er komið fram talríkar ferðir og stendur við. Eitt av seinnu dømunum um ringa stevið hevur verið málið um Búskapargrunn Føroya, sum løgmaður, fíggjarmalaráðharrin og landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum hava kjakast um alment í fjølmiðlunum hesar seinastu tvær vikurnar.

Løgmaður á einu síðuni og fíggjarmálaráðharrin og landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum á hinari síðuni, eru ógvuliga ósamdir um, hvussu uppskotið um Búskapargrunn Føroya eigur at síggja út, tá tað einaferð verður borið í tingið, og tann ósemjan var ikki loyst, tá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, og Høgni Hoydal, landsstýrismaður við sjálvstýrismálum løgdu eitt fyribils uppskot um búskapargrunnin fram fyri tingmonnum og fjølmiðlum hósdagin í farnu viku.

Brotnar avtalur

Tað fekk Annfinn Kallsberg, løgmann, at skýra uppskotið »hálvliðugt« í grein í Dimmalætting, og í almennari viðmerking í dag svarar ein harmur Karsten Hansen aftur upp á tað, sum hann kallar ørkymlandi ákærur frá løgmanni.

Løgmaður fyltist í blaðgreinini í Dimmalætting á, at fyribilsuppskotið varð lagt fram fyri tingmenn áðrenn semja var um uppskotið í samgonguni.

– Hetta eru úttalilsi frá løgmanni, sum eg ikki vil hava sitandi á mær. Tey ganga beint ímóti greiðum politiskum avtalum, sigur Karsten Hansen í viðmerkingini,ið er prentað á síðu 9 í blaðnum í dag.

Blaðið misskilti

Karsten Hansen nýtir í viðmerking síni eisini høvi til at vísa aftur, at hann hevur mælt til at privatisera almennar ognir fyri upp til 5 milliardir krónur. Hetta stóð at lesa sum tíðindi í Dimmalætting fyrr í vikuni. Karsten Hansen metir, at blaðið helst hevur misskilt tað, sum búskaparfrøðingar hava skrivað í álitinum um Búskapargrunnin, har tað stendur, at um so er, at almennar ognir verða seldar, so kann talan gerast um upphæddir upp ímóti 5 milliardum krónum.

– Onki uppskot um privatisering liggur í mínum uppskoti til Búskapargrunn, sigur Karsten Hansen í viðmerkingini.

Troyttur av stevinum

Viðmerkingin hjá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, ber brá av, at fíggjarmálaráðharrin er um at troyttast av vánaliga stevinum í samgonguni. Millum annað leggur hann eftir formanni Fólkafloksins fyri, sum blaðstjóri á Dagblaðnum, at forða fyri at samgongunar vilji verður framdur.

Eisini sigur Karsten Hansen tað vera ørkymlandi at verða átalaður av løgmanni fyri ikki at gera sambært avtalum, tá landsstýrismenn í egna flokki løgmanns sleppa undan átalu, tá teir bróta avtalur.

– Hann (løgmaður, blaðm.) átalar ikki alment landsstýrismenn í sínum egna flokki, sum ferð eftir ferð hava brotið allar siðvenjur í politiskum arbeiði, sigur Karsten Hansen í viðmerking síni.

Løgmaður sigur í stuttari viðmerking við Sosialinum, at hann stendur við orðini um, at uppskotið bara er hálvliðugt.

– Uppskotið er ikki samtykt á formligum landsstýrisfundi, og tað verður tað heldur ikki íu verandi líki. Karsten Hansen hevur fingið greitt at vita á fundi 23. juli, at Fólkaflokkurin er ósamdur við uppskotinum. Vit vilja hava eina útgjaldskipan við í uppskotið áðrenn tað verður borðið niðan í tingið, sigur Annfinn Kallsberg, løgmaður.

Hvar blivu programnevndirnar av

Dan R. Petersen, javnaðartingmaður, vil hava at vita hví ongar programnevndir eru settar at ráðgeva almennu loftmiðlunum, síðan uppskot hansara um at broyta lógina um kringvarp varð samtykt fyri góðum ári síðan

LOFTMIÐLAR
Rúnar Reistrup

Mentamálaráðharrin, Óli Holm, sum millum annað hevur loftmiðlamál um hendi, skal svara einum fyrispurningi frá javnaðartingmanninum Dan R. Petersen um, hví programnevndirnar til Sjónvarp Føroya og Útvarpi Føroya ikki eru settar enn, nú meira enn eitt ár er farið, síðan broytta løgtingslógin um kringvarp varð sett í gildi 17. mai í fjør.

Sambært broytingini løgtingslógini um kringvarp, sum Dan R. Petersen sjálvur legði fram uppskot um, skal landsstýrismaðurin við loftmiðlamálum seta tvær 9-mannanevndir at ráðgeva ávikavist Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya viðvíkjandi programvirksemi.

Politiskt óheft

Í grundgevingunum til broytingaruppskotið fórdi Dan R. Petersen tá fram, at tað við verandi lóg var ov lætt hjá politikarum at seta nevndir við politiskari slagsíðu at ráðgeva almennu loftmiðlunum. Við broytingunum, skuldi hetta gerast ómøguligt við tað, at óheftir felagsskapir og stovnar skuldu tilmæla nevndarlimirnar.

Sambært lógini skulu níggju felagsskapir og stovnar hvør tilmæla tvey fólk av ymiskum kyni til nevndarlimir. Landsstýrismaðurin skal so velja annað av hesum sum lim.

Men hóast allar tilmælingarnar, sambært Dan R. Petersen, vórðu gjørdar beinanvegin, so hevur landsstýrismaðurin ikki sett nakra av programnevndunum enn.

Dan R. Petersen sigur í fyrispurningi sínum, at tað er ein háðan ímóti loftmiðlum og hyggjarum og lurtarum teirra at ongar programnevndir eru settar.

Teir níggju felagsskapirnir og stovnarnir, sum skulu tilmæla evnir til teir samanlagt 18 nevndarsessirnar í programmenvndunum eru:

Fróðskaparsetur Føroya, Kristiligt hyggjara- og lurtarafelag, Føroya Ungdómsráð, 7 mannabólkurin av yrkisfeløgum, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Blaðmannafelag, Føroya Musikkskúli, Rithøvundafelag Føroya, og ÍSF.